# Eitt politiskt alternativ

## Ein liberalur tjóðskaparflokkur, til reiðar at fara til verka



Poul Michelsen, løgtingsmaður og stigtakari til átakið við nýggja flokkinum.

Vit hava gjørt av, at fara undir at savna tær neyðugu undirskriftirnar, sum skulu til, fyri at ein nýggjur, liberalur tjóðskaparflokkur beinan vegin kann virka í tingarbeiðinum og kann stilla upp til komandi løgtingsval.

Flokkurin verður í Løgtinginum umboðaður av Poul Michelsen, løgtingsmanni.

Vit biðja um tína tilsøgn til, at átakið Framsókn kann skrásetast sum politiskur flokkur.

Hetta kanst tú gera við at skriva og undirskriva teg á hjálagda lista.

## Lat okkum røra í grýtuni

Politiska skipanin melur í ring og er koyrd føst. Ósemjur og manglandi álit mynda ráðaloysið, sum valdar.

Tær broytingar, ið eru neyðugar at gera innan høvuðstættirnar í búskapinum - og sum skulu til, fyri at tryggja okkum vælferðina - verða ikki gjørdar.

Eitt politiskt átak er neyðugt - eitt átak, sum kann savna tær kreftir, sum vilja broytingar og megna at arbeiða tvørturum tey traditionellu politisku mørkini. Eitt átak, sum fer eftir málinum og ikki manninum.

Vit eru sannførd um, at eitt liberalt og tjóðskaparligt átak kann gera munin.

**Framsókn vil**, at vinnulív og privata fyritaksemið - tey liberalu virðini - í nógv størri mun sleppa at virka í búskapinum og soleiðis tryggja menning, trivnað og vælferð.

**Framsókn vil**, at tað persónliga frælsið - tey liberalu virðini - tryggja tí einstaka rættin til at liva frælst - í tráð við tey mannarættindi, ið eru okkum givin.

**Framsókn vil**, at Føroya fólk sjálvt forvinnur tann pening, sum skal til fyri at reka okkara samfelag - vitandi at tað bert er hegni, áræði og ágrýtni, sum kann tryggja okkum, at tað hendir.

**Framsókn vil**, at grundhugsjónin undir øllum virksemi í Føroyum - alment sum privat - er grundað á burðardygd.

**Framsókn vil**, at Føroyar í nógv størri mun gerast partur av alheims -samfelagnum, og vil beina burtur tær forðingar, sum eru á leiðini.

**Framsókn vil**, at fokus verður sett á skúlaverkið og at vit fáa fleiri og hægri útbúgvingar í Føroyum.

**Framsókn vil**, at eitt ríkt og fjølbroytt mentanarlív fær góðar umstøður at virka undir.

## Framsókn - ein liberalur tjóðskaparflokkur

Gundadalur 19 - FO-100 Tórshavn - framsokn@framsokn.fo